Lív aftur í Garðarnar

Gamla pakkhúsið á Gørðinum í Vági skal nú gerast ístand so at tað kann brúkast til alskyns mentanarlig endamál. Eitt nú skal sjósavn gerast í húsinum

ÁKI BERTHOLDSEN



Nú kemur lív aftur í gamla umhvørvið niðri á Gørðunum í Vági. Eitt nú skal eitt sjósavn gerast í tí gamla pakkhúsinum og pakkhúsið verður ein mentanarligur miðdepil

Nú kemur tað gamla pakkhúsið á Gørðinum aftur til heiður og æru, tí eftir at tað hevur staðið at rapa í fleiri ár, verður tað nú umvælt so at tað kann brúkast til alskyns mentanarlig endamál.

Í løtuni eru tað seks feløg í Vági, sum húsast í tí rúmliga pakkhúsinum, sum tey hava keypt fyri einar 170.000, eftir tí, vit hava fingið upplýst.

Tey seks feløgini eru Grindabátafelagið, Kappróðrarfelagið, Felagið Garðabrúgv, Johanna, Fornminnissavnið og Nýggjársnevndin.

Tey feløgini ætla nú at gera húsini ístand og Vágs Býráð hevur samtykt at stuðla ætlanini við 72.000 krónum í ár.

Ætlanin er at gera húsini ístand, so at øll feløgini kunnu húsast har undir góðum umstøðum, umframt at ein salur skal gerast til ymisk tiltøk.

Men somuleiðis er ætlanin at gera eitt sjósavn í húsinum.

Arbeitt verður nú víðari við hesum og ætlanin er so at savna ymsar lutir saman, sum hava áhuga hjá einum slíkum savni.

Húsið er stórt, tað er í fýra hæddum og hvør hæddin er 140 fermetrar. Tá ið býráðið játtaði at stuðla arbeiðnum, kom fram, at býráðið metti ein rættiligan mentanarligan fong verða í at fáa lív aftur í hetta húsið, har tað fyrr var so nógv virksemi.

Fleiri býráðslimir hildu, at verður húsið gjørt ístand, kann tað skapast eitt ógvuliga livandi og følbroytt umhvørvi við ymsum tiltøkum, sum hava tilknýti til sjógvin, á hesum plássi, sum fyrr hevði so stóran týdning fyri Vág.

Keypti stykkið fyri 200.000 kr.

Vágs Býráð hevur samtykt at keypa stykkið ímillum handilin hjá Solveig Johanesen og Skóbúðina hjá Solveig.

Rudie Magnussen eigur tað 1.171 fermetra stóra stykkið, men hon er sinnað at selja kommununi tað fyri 200.000 krónur og tað tók Býráðið av.

Kommunan hevur ikki nakað ávíst endamál við stykkinum.

Men á býráðsfundinum varð víst á, at stykkið liggur sera væl fyri.

Ætlanin er nú at býta tað sundur so at ovara helvtin verður lagt til vegin og niðara helvtin verður lagt til Vágs Havn.

–Áki–

Nógvir møguleikar í Vági

Í Vági eru nógvir møguleikar til fólk, sum arbeiða í oljuvinnuni, ella aðrastaðni.

Hetta svarið hevur Suðuroyar Oljuvinnuráð fingið frá Vágs Býráð.

Oljivinnuráðið hevði spurt býráðið, hvørjir møguleikar Vágs kommuna hevur at bjóða eini møguligari, komandi oljuvinnu, eitt nú skrivstovuhøli, bústaðarmøguleikar frítíðarmøguleikar o. s.fr.

Býráðið hevur samtykt at svara Oljuvinnuráðnum aftur, at tað eru nógvir møguleikar í kommununi.

Býráðið metir, at tað eru eini 15 hús í Vági, sum kunnu fáast til leigu ella til keyps, sjálvandi treytað av, at prísurin er tann rætti.

Somuleiðis eru nógv, stór hús í bygdini, sum er væl hóskandi til skrivstovur.

Og frítíðarmøguleikar tróta heldur ikki í Vági bæði til innandura og uttandura virksemi

Vit hava bæði svimjihylur og fótbóltsvøllur ítróttarhøll og fimleikarhøll, har møguleiki er fyri alskyns ítrótti, og har er eisini billiardhús, hevur Vágs Býráð samtykt at svara Suðuoryar Oljuvinnuráði.

–Áki–

Allir vágbingar reint vatn

ÁKI BERTHOLDSEN

Vágs Býráð hevur nú samtykt at gera eitt vatnreinsiverk afturat í Vági.

Tað reinsiverkið skal gerast við tann stóra brunnin vesturi við Gjógvará og tað skal eisini verða liðugt í ár, varð upplýst á býráðsfundi í farnu viku

Frammaundan er eitt reinsiverk við ein brunn longur úti í bygdini.

Bæði reinsiverkini reinsa 20 tons um tíman.

Tá ið hetta reinsiverkið er gjørt, fer tað at bera til at útvega øllm vágbingum reint vatn. Men fleiri privat vatnfeløg eru í Vági, og tað veldst um tey, um tey hava áhuga fyri at binda rørleiðingarnar frá reinsiverkinum

Ein heilt natúrlig avleiðing

– Uppskotið hjá Búskaparráðnum um ein fiskidagamarknað kann ikki koma óvart á nakran, sum halda, at tað skal bera til at keypa og selja fiskidagar, sigur formaðurin í Meginfelag Útróðrarmanna

ÁKI BERTHOLDSEN



– Eg skilji ikki, hví uppskotið um at stovna ein fiskidagamarknað skal koma so óvart á menn.

– Tí hetta er ikki annað enn ein heilt natúrlig avleiðing av tí førda fiskivinnupolitikkinum.

Enn eru tað ikki nógv, sum hava tikið undir við uppskotinum hjá Búskaparráðnum um ein almennan fiskidagabanka.

Men formaðurin í Meginfelag Útróðrarmanna er ein av teimum higartil heilt fáu, sum halda, at uppskotið er ikki heilt burturvið.

Chris Jan Michelsen leggur dent á, at Megnfelag útróðrarmanna er avgjørt ímóti at tað skal bera til at keypa og selja fiskidagar.

– Men hjá teimum, sum taka undir við tí, er uppskotið um ein fiskidagamarknað ikki annað enn eitt heilt natúrligt stig fram ímóti tí, sum tey vilja hava, nevniliga fult frælsi á fiskivinnuøkinum.

Var alla tíðina ætlanin

Chris Jan Michelsen sigur tískil, at hjá teimum, sum taka undir við, at ongar avmarkingar skulu vera, er uppskotið hjá Búskaparráðnum als ikki burtur úr vón ov viti, sum onkur hevur tikið til.

–Hetta uppskotið er tó eitt sindur meiri víðgongt, enn vit eru von við. Tí hetta leggur upp til fullkomiliga fræls, handilsig viðurskifti.

Chris Jan Michelsen sigur, at í løtuni eru tær avmarkingar í fiskivinnuni, at eigaraviðurskiftini til fiskirættindini verða løgd føst.

– Nú er tað so, at ávísir menn, sum longu eru í vinnuni, fáa fiskirættindi fyri einki, sum teir so varðveita, og kunnu selja við tí vinningi teir kunnu fáa, tá ið teir gevast, ella leggja um.

– Men hetta er bara galdandi fyri tað fyrsta ættarliðið av vinnulívsfólki.

– Og fyrsta ættarlið kann illa rópa seg uppá handilslig viðurskifti, tí teir eru komnir ókeypis upp í vinnuna.

– Men annað ættarlið av vinnulívsmonnum er verri fyri, tí teir noyðast at keypa fiskirættindi frá teimum, sum longu eru í vinnuni.

Og Chris Jan Michelsen sigur, at fyri øll onnur, enn netupp fyrsta ættarlið av vinnulívsmonnum, er uppskotið hjá Búskaparráðnum meiri rættvís, enn skipanin, sum nú er.

– Tí verður ein almennur fiskidagamarknaður settur á stovn, standa allir á jøvnum føti og kunnu keypa fiskidagar frá einum óheftum í rætvísari kapping.

– Sostatt er skipanin, sum nú er, beinleiðis kappingaravlagandi við tað, at fyrsta ættarliðið av vinnulívsmonnum slapp ókeypis upp í vinnuna, men øll onnur hinvegin mugu betala fyri síni fiskirættindini.

Chris Jan Michelsen vísir eisini á, at hetta er ikki nakar nýggur tanki.

Hann vísir m.a. á, at á einum fundi í 1998 ímillum vinnuna og John Petersen, fiskimálaráðharra, sum tá var, segði hann, at viðurskiftini í fiskivinnuni skuldi vera so fræls sum gjørlig við fullu rættindum at keypa og selja dagar. Endamálið við tí skuldi verða, at flotin skuldi blíva so væl fyri, at hann var førur fyri at gjalda landskassanum eina tilfeingisrentu, gjørdi John Petersen púra greitt.

Formaðurin í MÚ vísir eisini á, at tað er ógvuliga sannlíkt at úrslitið av sakarmálinum í Íslandi um bátin, sum fiskaði, hóast hann onga kvotu hevði, verður, at íslendingar skipa ein kvotamarknað.

– Ein íslendskur kvotamarknaður er ikki longri burtur enn so, enn at hann er verululeiki, um rætturin kemur til ta niðurstøðu, at tann førdi fiskivinnupolitikkurin um ognarrættin til kvoturnar, ikki er sambæriligur við grundlógina.

Hann sigur sostatt, at tað er ikki Búskaparráðið, sum hevur fostrað tankan um ein fiskidagamarknað.

– Tað hava politikarar. Og teir, sum gera seg til talsmann fyri handilsligum viðurskiftum í fiskivinnuni, mugu eisini fylgja tí, sum hendan hugsjónin førir við sær, sigur Chris Jan Michelsen.

– Vit eru eisini av teirri áskoðan, at førdi fiskivinnupolitikkurin er ikki sambæriligur við lógartekstin, har tað stendur, at tilfeingið er fólksins ogn og at endamálið skal vera við til at skapa virksemið kring landið. Tað ger útróðurin, sum er. Men verða rættindini miðsavnað á nakrar á fáar hendur- og tað kann skjótt verða avleiðingin, um tað verður fult frælsið at keypa og selja fiskidagar- so ger hann tað ikki longur.

Sancy undir n‡ggja framlei›slu

Fiskavirki› Sancy Seafood í Vági er gó›kent til saltfiskaframlei›slu. Sølt fløk skulu tryggja virkinum eina javnari framlei›slu

DÁNJAL HØJGAARD

Mynd: Jens Kristian Vang

Salfiskaframlei›sla skal geva Sancy Seafood í Vági eitt bein afturat at standa á, so at arbei›i ver›ur stø›ugari.

Sancy Seafood var í farnu viku løggilda› sum saltfiskaframlei›ari. Virki› hevur sostatt møguleika at gerast eitt kombinera› fiskavirki, sum bæ›i arbei›ir salta›an og feskan fisk.

Virki› kann fara undir at framlei›a bæ›i saltfløk og saltfisk. Men í fyrstu atløgu ætla tey bert at leggja seg eftir søltu fløkunum, tí framlei›slan av saltfiski krevur størri íløgur.

Javnari framlei›sla

Higartil hevur virki› bert arbeitt feskan fisk. Ta› hava veri› uppí 25 fólk til arbei›is á virkinum, men arbei›i› hevur veri› ógvuliga óstø›ugt.

-Higartil hevur ikki veri› arbeitt meira enn 1-2 dagar um vikuna, og vit hava ikki havt arbei›i hvørja viku. Í framtí›ini kunnu vit væntandi arbei›a einar 3-4 dagar um vikuna, sigur Jens Petur Brattalí›, virkislei›ari.

-Kombinatiónin av salta›um og feskum fløkum fer at skapa meira stø›ugt arbei›i, sigur hann.

Salfiskaframlei›slan á Sancy Seafood kann byrja so skjótt sølusáttmálarnir eru komnir upp á pláss. Saltfiskaprísurin er gó›ur fyri tí›ina, og ta› sær bjart út, ver›ur sagt.

Ta› var Heri Hjelm, sum í síni tí› bygdi virki› á Tjørn at kryvja laks á. Felagi› Southern Seafood átti virki› eina stutta tí›, til eigararnir av trolaranum Sancy yvirtóku ta› í 1998.

Tríkanturin snøgga›ur

Arbei›i› at frí›ka øki› hjá n‡ttársnevndini í Vági ver›ur væntandi li›ugt komandi viku

HØGNI MOHR

Mynd: Jens Kristian Vang

Fimm mans arbei›a vi› at leggja grót á tríkantin hjá n‡ttársnevndini í Vági. Øki› er sera snøgt, nú standmynd eisini er sett upp

Kenda n‡ttársøki› í Vági ver›ur nú frí›ka› vi› gó›um gróti úr Skør›unum í Porkeri. Øki› er vestaliga í b‡num, á tríkantinum undir Báraldarbakka. Har ver›ur bátur brendur hvørt gamlaárskvøld.

Longu í fjør var› fari› undir at gera gir›ing um øki›. Standmynd var› eisini reist á›renn vágbingar sleptu árinum 1999.

Eftir seinasta n‡ttárshaldi› fóru kommunumenn í bygdini undir umfatandi grótarbei›i›. Grót ver›ur lagt á allan tríkantin, sum hann er, og í hesum sambandi er rættur bálsta›ur gjørdur mi›skei›is á økinum.

Arbei›i› ver›ur væntandi li›ugt komandi viku.

Vágs B‡rá› umhugsar kortini at frí›ka øki› upp aftur meira seinni. Tá i› ta› fer at sumra fara kommunumenninir kanska at seta beinkir upp vi› øki›. So kunnu vágbingar og gestir bukka sær beinini vi› vakra bálsta›in í Vági. Eisini ver›a ljóskastarar settir at l‡sa á standmyndina.